# Birmingham er áhugað í Toda

**Men enn hevur FCK einki sagt. Talan er bara um ynskilista hjá Trevor Francis**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*



*Hóast bløðini hava úr at gera við at bera tíðindini, so veit Todi Jónsson einki um, at hann skal vera ávegis til bretskan fótbólt*

Skulu vit trúgva donsku pressuni, sum hevur tíðindini frá Birmingham Evening News, so er tað nógv, sum bendir á, at Birmingham City, sum er eitt av stóru feløgunum í næststørsta býnum í Onglandi, er áhugað í at keypa fleiri FCK spælarar.

Verjuspælarin, Thomas Rytter sigst vera ein av spælarunum, og so verður tosað um ein sentralan miðvallara og ein álopsspælara. Í pressuni verður sagt, at miðvallarin ivaleyst er Christian Poulsen, og við at útiloka aðrar verður roknað við, at Todi Jónsson er álopsmaðurin, sum teir í Birmingham eru áhugaðir í.

## Kendur venjari

Trevor Francis, sum í síni tíð var ein góður álopsspælari í høgru á eingilska landsliðnum, er fótbóltsbossur í Birmingham City, sum roynir at stríðast fyri at sleppa úr næstbestu og upp í bestu deildina í Onglandi. Tá FCK og Lazio spældu í Parkini, var Birmingham venjarin millum áskoðararnar. Hann hevur síðani váttað, at ørindini vóru at sýna verjuspælaran Jacob Laursen. Tað tykist kortini ikki, at Birmingham fer at keypa henda spælaran, sum fleiri onnur feløg eisini sigast vera áhugað í.

– Síðani havi eg og eisini onnur umboð fyri felagið hjá okkum sæð nakrar dystir hjá FCK, og har eru fleiri spælarar, sum vit fegin høvdu viljað havt at umboða okkum, sigur Trevor Francis við Birmingham Evening News.

## Todi veit einki

Danska pressan hevur endurgivið hetta, og teir halda altso, at tað er rættuliga sannlíkt, at Todi Jónsson er álopsmaðurin. Tað gera teir, tí teir halda Zuma vera ov kostnaðarmiklan – hann verður mettur til 70 milliónir á fótbóltskeypsskálanum – og tí teir halda, at Birmingham neyvan ar áhugað í at knýta Heine Fernandez ella Patrick Simpson afturat sær.

Birmingham sigst vera væl fyri. Í hesi vikuni skal venjarin leggja síni ynski fyri leiðsluna í felagnum, men í Birmingham Evening News verður ikki hildið, at tað verður nakar trupulleiki at fáa leiðsluna við upp á at bjóða upp á FCK spælararnar.

Um FCK leiðlsan er sinnað at selja nakrar av bestu spælarunum, nú teir fyrireika seg at gera eina nýggja roynd í Europa Cup, er ein heilt onnur søga, sum fjølmiðlarnir ikki enn hava gjørt so nógv við.

Sjálvur hevur Todi Jónsson einki annað hoyrt um hetta enn tað, sum hevur verið at frætta í fjølmiðlunum. Todi hevur so ofta hoyrt og lisið um seg sjálvan, at tað hevur hann ongar viðmerkingar til.

# Ólavur Simonsen vann Íslandssúluna 2001

**Ikki óvæntað vann sterki klaksvíkingurin árligu Íslandssúluna, men hann fekk tó harða kapping frá tí unga Hans Kristian Simonsen**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Undan kappingarbyrjanini varð væntað, at Ólavur Simonsen uttan trupulleika kundi telva seg til sigurs, men javnleikur í fyrsta umfarinum ímóti Eyðun Lamhauge gav hinum ein eyka møguleika. Eitt nú gav tað Hans Kristian Simonsen eina vón um at basa fjórðfremsta telvaranum í Føroyum.

Ólavur reistist tó og vann øll síni seks næstu talvini, harav eitt ímóti júst Hans Kristiani. Ólavur segði undan kappingarbyrjanini, at hann visti væl at fleiri av okkara sterkastu telvarum ikki kundu luttaka og at hann tískil fór at vera stórfavorittur. Hann vildi bert hava dystarvenjing, og sjálvsagt eisini vinna kappingina. Hetta er rætti hugburður, tí ikki eru teimum mongu sum dámar alt ov væl favorittrolluna í føroyska talvheiminum.

Ólavur hevði nærum 300 meiri ratingstig enn næstovasti luttakarin, Hans Kristian, og sjálvt um hann misti bert hálvt stig, so misti hann 2,5 ratingstig. Men lógin sigur at um tú vinnur eina kapping ber ikki til at missa rating og tískil stendur Ólavur í stað á ratinglistanum. Hann endurvann við hesum sigrinum Íslandssúluna frá 1999.

Hans Kristian tapti bert tað eina talvið, og fekk tí heili seks stig av teimum sjey møguligum og rukku stigini til eitt trygt annað pláss.



*Hans Kristian Simonsen mátti lúta fyri favorittinum, Ólavi Simonsen, men ungi kollfirðingurin vann sær tó eitt trygt annað pláss í kappingini um íslandssúluna*

## Nýtt stjørnuskot

Eins og stríðið um fyrsta pláss varð drúgvt, var stríðið um triðja pláss bæði drúgvt og spennandi. Og serliga prógvaði tann sera ungi havnardrongurin Røgvi Mortensen at hann uttan iva verður stóra navnið í framtíðini. Hann telvaði respektleyst, og hevði hann ikki tapt í javna og áhugaverda talvinum ímóti tí roynda Sámal Christiansen, ja so hevði hann møguliga átt triðja plássið einsamallur. Rógvi kann vera heilt nøgdur við úrslit sítt, eitt deilt triðja pláss saman við Johan E. Hansen og Ingolf Debes, sum eisini óvæntað ognaði sær triðja plássið. Hesir tríggir fingu fýra stig, og lógu beint framanfyri nøvn sum Sámal Christiansen, Kára Durhuus, Brandur Jacobsen, Jákup Andreasen og Eyðun Lamhauge. Hesin seinasti fekk eina sera góða byrjan, men dovnaði eitt petti í seinnu helvt.

Íslandssúlan í ár varð ikki eins sterk sum væntað, og tí hevur Havnar Telvingarfelag lovað at leggja hana betur til rættis komandi árini, soleiðis at útisetar eisini kunnu luttaka. Væntandi verður hon telvað í juli næsta ár, ella tíðliga í august

## Talvið hesa vikuna

*Simonsen,Ó (2235) - Durhuus ,K (1755)*

**Íslandssúlan 2001 (4), 26.08.2001**



### Fronsk byrjan

1.e4 e6 2.d4 d5 3.Nd2 c5 4.Rigf3 Ric6 5.Bb5 a6 6.Bxc6+ bxc6 7.c3 cxd4 8.cxd4 Bb4 9.0-0 Bxd2 10.Bxd2 a5 (Ólavur hevur altíð lagt nógvan dent á útvikling, sjálvt um tað møguliga kostar finnur) 11.Rie5 Bd7 12.Fg4 g6 13.Ff3 Ff6 14.Fg3 (Frúgvaavbýting gevur svørtum meira javnt spæl) 14...h5 15.Bg5 Fg7 16.Rixd7 Kxd7 17.Rac1! (Eitt snøgt finnuoffur, sum Ólavur hevur roknað seg fram til) 17...Fxd4 18.exd5 exd5 19.Rxc6!! (Avgerandi rókaoffur, sum vinnur forserað) 19...Kxc6 20.Rc1+ Kd7 21.Fc7+ Ke6 22.Rc6+ Kf5 23.Fxf7+ Rif6 24.Rxf6+ Fxf6 [24...Kg4 25.h3+ Kxg5 26.Fxg6+ Kh4 27.Fg3#] 25.Fxf6+ Ke4 26.f3+ og Kári við svarta fólkinum valdi ikki óvæntað at gevast í hesari taptari støðu. Sera snøgga rókaoffrið hjá Ólavi avgjørdi talvið. 1-0



**Mentamálastýrið**
*Vinnu- og miðnámsskúladeildin*

## Projektkapping um miðnámsskúla í Suðuroy

Mentamálastýrið bjóðar við hesum til kapping um uppskot til nýggjan miðnámsskúla í Suðuroy.

Endamálið við kappingini er at fáa fram uppskot til skúla, ið kann gerast tíðarhóskandi karmur um fjølbroytt og framkomin útbúgvingartilboð fyri ung og tilkomin. Skúlin skal samstundis hava umstøður at gerast virkin partur av samfelagnum og geva møguleikar fyri at binda saman undirvísing, mentan, arbeiðslív og vinnulív í oynni.

Kappingin er almenn projektkapping, útskrivað sambært kappingarreglunum hjá Arkitektafelagi Føroya. Talan er um eina opna kapping, har øll, ið halda seg hava førleika at vera við, kunnu lata inn uppskot.

Til virðislønir og møgulig keyp av uppskotum hevur dómsnevndin kr. 200.000 at ráða yvir. Av hesi upphædd skal tó ein 1. virðisløn verða latin, til støddar ikki minni enn kr. 100.000.

Tilfar og treytir fyri kappingini fáast við at venda sær skrivliga til

**Arkitektafelag Føroya**
postboks 1293
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 4. september 2001

**Mentamálastýrið**

LEIÐARI TIL ELDING Í SMS • LEIÐARI TIL ELDING Í SMS



# Vit leita eftir tær!

Til Elding í SMS í Havn søkja vit eftir leiðara at byrja beinanvegin.

Elding er førandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert leiðarastarv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Somuleiðis bjóða vit góða løn og treytir, ið verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Vit vænta at tú ert ágrýtin, stinn/ur í leiðslu og dugnaligur í samstarvi við okkara viðskiftafólk og samstarvsfelagar.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 15. september 2001 og skal sendast til:

**Elding í SMS**
Postboks 1289
110 Tórshavn

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at seta seg í samband við Mads Andreas Winther, tel 21 62 30.

ELDING
SMS - Tel 319697

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

## Søkt verður eftir tímalærara til el-deildina

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum elektrikari, hava prógv sum el-installatørur og minst 2 ára starvsroyndir innan yrki. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun. Eisini er áhugi fyri støddalis- og evnafrøði, og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið skal setast skjótast tilber og í seinasta lagi 15. sept. 2001.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. sept. 2001.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlan, tlf. 311957.

**Tekniski skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75, postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311957 · Telefaks 316621
E-post: tst@tst.fo

GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Skjót levering

Sosialurin - 311820

Danstein
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

Uppsetan og skipan av barrum
Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilíkt
Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo
Sosialurin 311820